# Føroya Kærustovnur
# Avgerð um vinnumál

| Mál nr. :<br>23/20118 | Lóg:<br>Kappingarlógin § 11, stk. 1 | Avgerð tikin:<br>8. desember 2023 |
|---|---|---|

**Prísklemma**


**Samandráttur:**
**Kært er um, at Kappingarráðið tann 24. juli 2023 hevur tikið avgerð um, at Føroya Tele hevur framt brot á § 11, stk. 1 í kappingarlógini við at hava brúkt prísklemmu í sambandi við tingingar um eina FullMVNO avtalu.**

**Føroya Kærustovnur hevur avgjørt at broyta avgerðina hjá Kappingarráðnum.**

**Avgerðin er grundað á, at tað við støði í upplýsingunum í málinum ikki er grundarlag fyri at staðfesta, at Føroya Tele í 2017 hevði eina ráðandi støðu á marknaðinum fyri heilsølu av FullMVNO avtalum innan fartelefoni í Føroyum. Treytin um ráðandi støðu í § 11, stk. 1 í kappingarlógini er sostatt ikki lokin og Føroya Tele hevur sostatt ikki brúkt prísklemmu í stríð við kappingarlógina.**


*Viðmerkingar partanna og upplýsingar í málinum verða ikki endurgivin í fullum líki.*

**Avgerð hjá Føroya Kærustovni**
Sbrt. § 11, stk. 1 í kappingarlógini er tað ikki loyvt eini ella fleiri fyritøkum og øðrum at misnýta eina ráðandi marknaðarstøðu.

Tað eru sostatt tvær treytir, ið skulu vera loknar, áðrenn ein framferð er í stríð við § 11, stk. 1 í kappingarlógini; Fyritøkan skal hava eina ráðandi støðu á viðkomandi marknaðinum, og fyritøkan skal misnýta sína ráðandi støðu.

Tað er Kappingarráðið, ið hevur próvbyrðuna fyri, at talan er um eina ráðandi støðu, og at hon verður misnýtt.

Forboðið ímóti misnýtslu av ráðandi støðu í føroysku kappingarlógin svarar til ásetingar í ES-kappingarrættinum, og tískil er ES-rættarvenja eisini vegleiðandi fyri tulkingina av § 11 í kappingarlógini, sí part C í almennu viðmerkingunum til kappingarlógina, løgtingsmál nr. 110/2006.

Tá ið talan er um prísklemmu, eru tað sambært ES-rættarvenjuni tríggjar yvirskipaðar treytir, ið skulu vera loknar, fyri at talan er um prísklemmu í stríð við § 11, stk. 1 í kappingarlógini. Í fyrsta lagi skal fyritøkan vera ráðandi á ovara marknaðinum (heilsølumarknaðinum). Í øðrum lagi skal talan vera um prísklemmu fyri ein minst líka effektivan kappingarneyta. Í triðja lagi skal framferðin hjá ráðandi fyritøkuni vera egnað til at avmarka kappingina.

# Føroya Kærustovnur
# Avgerð um vinnumál

Í fyriliggjandi málið hevur Kappingarráðið tikið avgerð um, at Føroya Tele hevur brúkt prísklemmu í stríð við § 11, stk. 1 í kappingarlógini.

Føroya Tele hevur funnist at málslýsingini í avgerðini hjá Kappingarráðnum og hevur harumframt ført fram, at Fjarskiftiseftirlitið longu hevur tikið avgerð um prísklemmu, og at Kappingarráðið tí ikki hevur heimild at taka avgerð um sama spurning í tí sama málinum.

Áðrenn støða verður tikin til, um Føroya Tele hevur brúkt prísklemmu í stríð við § 11, stk. 1 í kappingarlógini, fer Føroya Kærustovnur at gera viðmerkingar til atfinningina hjá Føroya Tele og viðgera spurningin um, hvørt Kappingarráðið hevur heimild at taka avgerð um, at Føroya Tele hevur brúkt prísklemmu í stríð við § 11, stk. 1 í kappingarlógini.

<u>Lýsingin av gongdini í málinum</u>
Føroya Tele hevur funnist at málslýsingini í avgerðini hjá Kappingarráðnum.

Føroya Tele hevur greitt frá, at lýsingin í avgerðini hjá Kappingarráðnum av gongdini í málinum ikki er ein rættvísandi lýsing av tí veruligu gongdini í málinum, og at Føroya Tele verður lýst sum at hava verið ósamstarvssinnað og at hava drigið málið út eftir at hava fingið eina greiða áheitan frá Tosa um atgongd til fartelefonkervið hjá Føroya Tele og at enda at hava givið Tosa eitt endaligt tilboð, ið Føroya Tele ikki sjálvt hevði klárað at rikið sítt smásøluvirksemi við.

Greitt verður frá, at Føroya Tele er av teirri áskoðan, at tingingarnar um ein endaligan prís til Tosa fyri atgongd til fartelefonkervið hjá Føroya Tele ongantíð endaðu, og Tosa móttók ongantíð eitt endaligt tilboð. Føroya Tele var til reiðar at samráðast víðari og finna eina loysn, men Tosa sleit tingingarnar.

Greitt verður frá, at Kappingarráðið sum fyrisitingarmyndugleiki hevur ábyrgdina av, at eitt mál verður upplýst nøktandi og rætt, áðrenn myndugleikin tekur avgerð í málinum, og at tá Kappingarráðið í avgerðini velur at greiða frá gongdini í málinum, so skal Kappingarráðið tryggja sær, at upplýsingarnar, ið verða endurgivnir, eru rættar og geva eina rættvísandi mynd av gongdini í málinum.

Kappingareftirlitið hevur greitt frá, at tey viðurskiftini, ið Føroya Tele finnist at, ikki innganga í metingini ella niðurstøðuni í avgerðini, og at reglubrot 9-22 í avgerðini eru grundað á teldupostsamskifti, ið var millum partarnar í 2016 og 2017. Greitt verður frá, at Kappingareftirlitið ikki ger nakrar niðurstøður her, men einans endurgevur objektivar upplýsingar.

Greitt verður frá, at tað, ið Føroya Tele vil hava lagt afturat málslýsingini, eru subjektiv uppáhald, ið Føroya Tele ikki megnar at skjalprógva, og sum Kappingareftirlitið metir vera óviðkomandi fyri lýsingina av málinum.

# Føroya Kærustovnur
# Avgerð um vinnumál

Í mun til atfinningina hjá Føroya Tele um, at tilboðið, ið Føroya Tele bjóðaði Tosa, ikki var endaligt, hevur Kappingareftirlitið greitt frá, at teir prísirnir, ið innganga í prísklemmukanningini, eru endaligir á tann hátt, at Føroya Tele noktaði at lækka teir, men vildi heldur tingast víðari um eina avsláttarskipan.

Kappingareftirlitið hevur greitt frá, at tey meta seg hava lýst málið nøktandi fyri at kunna taka eina lógliga og materielt rætta avgerð í samsvar við upplýsingarskylduna.

Føroya Kærustovnur viðmerkir, at fyriliggjandi mál snýr seg um, hvørt Føroya Tele hevur brúkt prísklemmu í stríð við § 11, stk. 1 í kappingarlógini. Málsevnið er sostatt ikki drál, og spurningurin er tí, um málslýsingin hevur nakran veruligan týdning fyri málið.

Føroya Kærustovnur metir, at allir prísir, ið Føroya Tele bjóðar (møguligum) kappingarneytum, skulu yvirhalda kappingarreglurnar, óansæð um teir eru endaligir ella ikki.

Mett verður somuleiðis, at tað ikki er ein treyt fyri at kunna staðfesta, at ein fyritøka hevur brúkt prísklemmu í stríð við § 11, stk. 1 í kappingarlógini, at prísirnir, ið fyritøkan bjóðar, eru endaligir. Føroya Kærustovnur metir sostatt, at tað, at Føroya Tele ynskti at samráðast víðari um eina FullMVNO avtalu, ikki í sjálvum sær er nóg mikið til at talan ikki kann vera um prísklemmu í stríð við § 11, stk. 1 í kappingarlógini.

Hóast málslýsingin skal avspegla tað, ið veruliga er farið fram í málinum, og partarnir í málinum tykjast at hava ymsa áskoðan av hesum, so metir Føroya Kærustovnur samanumtikið ikki, at málslýsingin er avgerandi fyri viðgerðina og avgerðina í júst hesum málinum, og tí verður ikki gjørt meira við hendan partin av kæruni.

<u>Heimild at viðgera málið</u>
Føroya Tele hevur greitt frá, at Tosa í 2017 sendi kæru til Fjarskiftiseftirlitið, ið m.a. snúði seg um prísmismun, manglandi gjøgnumskygni og drál.

Greitt verður frá, at Fjarskiftiseftirlitið tann 21. mars 2018 tók avgerð í málinum, har Fjarskiftiseftirlitið kom fram til, at prísirnir hjá Føroya Tele og tingingarnar um prísirnir ikki vóru í samsvar við fjarskiftislógina. Fjarskiftiseftirlitið bað tí Føroya Tele um at taka upp aftur tingingarnar við Tosa og boðaði frá, at Tosa kundi kæra málið til Fjarskiftiseftirlitið av nýggjum, um partarnir ikki innan 4 vikur vórðu blivnir samdir um eina MVNO-avtalu.

Føroya Tele hevur greitt frá, at: "*Telestyrelsens afgørelse må forstås sådan, at den blandt andet vedrører spørgsmålet om margin squeeze, idet Telestyrelsen direkte anfører, at Telestyrelsen ikke vurderer, at Føroya Teles priser er i overensstemmelse med telelovgivningen, samt træffer afgørelse om, hvordan Føroya Tele skal fortsætte sin adfærd i forhandlingerne med Tosa.*

# Føroya Kærustovnur
# Avgerð um vinnumál

*Telestyrelsen har således allerede truffet afgørelse om spørgsmålet om margin squeeze, hvilket medfører, at Konkurrencerådet ikke også har kompetence til at træffe afgørelse om spørgsmålet. Tværtimod må endnu en afgørelse om spørgsmålet træffes af Telestyrelsen. Dette er i overensstemmelse med det, der fremgår af Telestyrelsens afgørelse. (...)".*

Kappingareftirlitið hevur greitt frá, at Kappingarráðið og Fjarskiftiseftirlitið ikki hava viðgjørt sama mál.

Greitt verður frá, at Fjarskiftiseftirlitið tann 21. mars 2018 tók avgerð um, at partarnir skuldu fara undir veruligar samráðingar og uttan óneyðugt drál, og at sagt varð, at um Tosa hevði viðvirkað til, at ein semja varð funnin uttan óneyðugt drál, men at partarnir hóast hetta ikki vóru komnir á mál innan 4 vikur, kundi Tosa kæra málið av nýggjum til Fjarskiftiseftirlitið. Greitt verður frá, at Fjarskiftiseftirlitið sostatt ikki hevur tikið avgerð um, at margin squeeze er farið fram ella at brot er framt á áseting í fjarskiftislógini, og Fjarskiftiseftirlitið hevur somuleiðis ikki góðkent ella álagt prísir, ið tingast varð um í hesum málinum.

Kappingareftirlitið hevur greitt frá, at Fjarskiftiseftirlitið hevur kannað, um Tosa kundi klára seg við teimum prísunum, ið teir fingu bjóða frá Føroya Tele. Hetta metti Fjarskiftiseftirlitið ikki, at Tosa hevði klárað. Greitt verður frá, at hendan kanningin ikki er tann sama sum kanningin hjá Kappingareftirlitinum, og at kanningin hjá Fjarskiftiseftirlitinum ongantíð hevði verið góðtikin sum prógv fyri margin squeeze.

Greitt verður frá, at avgerðin hjá Kappingarráðnum snýr seg um, at Føroya Tele hevur brúkt prísklemmu, meðan Fjarskiftiseftirlitið hevur tikið avgerð um at biðja partarnir um at fara undir veruligar samráðingar, ið er ein avgerð sum er tikin sbrt. § 7 í fjarskiftislógini, ið snýr seg um atgongd. Greitt verður frá, at Fjarskiftiseftirlitið ikki hevur brúkt tær heimildir, ið eru at finna í § 8-16 í føroysku fjarskiftislógini.

Greitt verður frá, at; "*(...) avgerðin hjá Fjarskiftiseftirlitinum er ein ex ante avgerð, ið hevur til endamáls at facilitera atgongd til eitt kervið, meðan avgerðin hjá Kappingareftirlitinum er ein ex-post avgerð sum snýr seg um hvørt teir prísir, sum Føroya Tele hevur bjóðað TOSA vóru margin squeeze í stríð við § 11.".*

Føroya Kærustovnur vísir á, at avgerðin hjá Fjarskiftiseftirlitinum, dagfest 21. mars 2018, yvirskipað snýr seg um prísdiskriminering, manglandi gjøgnumskygni, tíðardrál og at sami fíggjarleiðari var í smásølu- og heilsøluvirksemi.

Í mun til spurningin um prísdiskriminering, manglandi gjøgnumskygni og tíðardrál hevur Fjarskiftiseftirlitið greitt frá, at sum partur av kærumálinum hevur Fjarskiftiseftirlitið latið gjørt kanning av prísunum, ið vórðu grundarlag undir tilboðnum frá Føroya Tele til Tosa, hetta fyri at fáa staðfest, um prísirnir eru á einum rímiligum støði. Úrslitið av hesi kanning var m.a., at tað ikki var grundarlag fyri at reka vinnuvirksemi sum MVNO við teimum bjóðaðu prísunum.

# Føroya Kærustovnur
# Avgerð um vinnumál

Vísandi til úrslitið av kanningini umframt til, at fjarskiftislógin leggur upp til reellar samráðingar á handilsligum grundarlagi, bað Fjarskiftiseftirlitið partarnir um at taka upp aftur reellar samráðingar, ið tóku støði í frágreiðingini, ið varð viðheft avgerðini. Fjarskiftiseftirlitið upplýsti at enda, at um partarnir ikki vóru komnir á mál við eini avtalu innan 4 vikur, so kundu Tosa kæra málið av nýggjum til Fjarskiftiseftirlitið.

Føroya Kærustovnur viðmerkir, vísandi til, at Fjarskiftiseftirlitið í avgerðini upplýsir, at Fjarskiftiseftirlitið hevur latið gjørt kanning av prísunum í tilboðnum frá Føroya Tele, og at komið varð fram til, at tað ikki var grundarlag fyri at reka vinnuvirksemi sum MVNO við teimum bjóðaðu prísunum, at tað er greitt, at Fjarskiftiseftirlitið í ein ávísan mun hevur kannað, um talan var um prísklemmu. Mett verður tó ikki, at hetta í sjálvum sær merkir, at Fjarskiftiseftirlitið hevur tikið avgerð um, at Føroya Tele hevur brúkt prísklemmu í stríð við serstøku kappingarreglurnar, ið eru galdandi fyri fjarskiftismarknaðin.

Fjarskiftiseftirlitið hevur tikið avgerð um, at Føroya Tele og Tosa skuldu taka upp aftur veruligar samráðingar, og at hetta skuldi gerast uttan óneyðugt drál. Føroya Kærustovnur metir, at hetta er ein avgerð, ið er tikin sbrt. § 7 í fjarskiftislógini, ið ásetir, at veitarar av almennum fjarskiftiskervi ella tænastum hava rætt og skyldu til innanhýsis at samráðast um avtalur um sambinding og at tryggja interoperabilitet við tí fyri eyga at bjóða út alment fjarskiftiskervi ella fjarskiftistænastu. Ásett er, at Fjarskiftiseftirlitið kann áleggja skyldur fyri at tryggja samband millum endabrúkarar, at skapa interoperabilitet millum tænastur ella at binda saman kervi.

Føroya Kærustovnur metir samanumtikið ikki, at avgerðin hjá Fjarskiftiseftirlitinum kann sigast at vera ein avgerð um, at Føroya Tele hevur brúkt prísklemmu í stríð við serstøku kappingarreglurnar, ið eru galdandi fyri fjarskiftismarknaðin, ið eru í kapitli 3 í fjarskiftislógini. Mett verður sostatt ikki, at avgerðin hjá Fjarskiftiseftirlitinum er til hindurs fyri, at Kappingarráðið kann viðgera spurningin um prísklemmu og taka avgerð um, at Føroya Tele hevur brúkt prísklemmu í stríð við kappingarlógina.

<u>Viðkomandi marknaður</u>
Fyri at meta um, hvørt ein fyritøka hevur misnýtt sína ráðandi støðu, sbrt. § 11, stk. 1 í kappingarlógini, er neyðugt at skilmarka viðkomandi marknaðin.

Ásett er í § 5, stk. 1 í kappingarlógini, at til tess at skilmarka viðkomandi marknaðir eftir kappingarlógini, verður kanning gjørd av eftirspurningar- og útboðsvaraseting og møguligari kapping. Møgulig kapping skal kannast, tá støðan hjá viðkomandi fyritøkuni á marknaðinum er skjalfest, og støðan gevur orsøk til iva, um lógarbrot er framt.

Ásetingin skal skiljast soleiðis, at varaseting í øllum førum skal kannast, meðan møgulig kapping skal kannast, um tað er neyðugt. Sambært viðmerkingunum til § 5, sí løgtingsmál 110/2006, er endamálið við at skilmarka marknaðir at gera greitt, hvørjar

kappingaravmarkingar eru, ella v.ø.o. um viðskiftafólkini hava aðrar møguleikar fyri veitingum av vørum og tænastum eisini landafrøðiliga. Ein ávísur vøru- og tænastumarknaður skal skiljast sum ein marknaður, ið brúkarin metir kann koma ístaðin (substituerbar), orsakað av eginleikunum hjá vørunum og tænastunum, prísi ella nýtsluendamáli.

Tá tað kemur til skilmarking av viðkomandi marknaði í sambandi við einum máli um prísklemmu er bæði neyðugt at skilmarka ein ovara markna (heilsølumarkna) og minst ein niðara markna (smásølumarkna). Orsøkin til hetta er, at prísklemma kann koma fyri, um ein fyritøka hevur eina ráðandi støðu á heilsølumarknaðinum og samstundis er virkin á smásølumarknaðinum, har fyritøkan kappast við øðrum fyritøkunum, ið keypa vørur ella tænastur frá ráðandi fyritøkuni á heilsølumarknaðinum.

Kappingareftirlitið og Føroya Tele eru samd um, at heilsølumarknaðurin skal skilmarkast til marknaðin fyri heilsølu av FullMVNO tænastum innan fartelefoni í Føroyum.

Vísandi til upplýsingarnar í málinum er Føroya Kærustovnur samdur í hesi skilmarking.

Sum áður víst á er tað í málum um prísklemmu ein treyt fyri at talan er um prísklemmu í stríð við § 11, stk. 1 í kappingarlógini, at fyritøkan, ið hevur brúkt prísklemmuna, er ráðandi á viðkomandi heilsølumarknaðinum. Hetta slagið av misnýtslu inniber, at tann ráðandi fyritøkan brúkar sína marknaðarstyrki á heilsølumarknaðinum fyri at fáa fyrimunir á smásølumarknaðinum. Tað er sostatt ikki ein treyt, at fyritøkan eisini hevur eina ráðandi støðu á smásølumarknaðinum

Føroya Kærustovnur fer tí í fyrstu atløgu at taka støðu til, um Føroya Tele hevði eina ráðandi støðu á marknaðinum fyri heilsølu av FullMVNO tænastum innan fartelefoni í Føroyum, tá møguliga brotið fór fram.

<u>Ráðandi marknaðarstøða</u>
Metingin av, um ein fyritøka hevur eina ráðandi støðu, skal altíð gerast ítøkiliga við støði í viðkomandi marknaðinum.

Sambært viðmerkingunum til § 11 í kappingarlógini, sí løgtingslóg nr. 110/2006, hevur ein fyritøka eina ráðandi støðu, tá fyritøka hevur eina so ráðandi búskaparliga støðu, at hon hevur møguleika at forða fyri munagóðari kapping á viðkomandi marknaðinum, tí nevnda støðan gevur fyritøkuni møguleika fyri óheftum atburði mótvegis kappingarneytum, viðskiftafólki og í síðstu atløgu brúkarunum.

Tað er ein heildarmeting, hvørt ein fyritøka hevur eina ráðandi støðu. Øll viðurskifti, ið hava týdning fyri, um fyritøkan kann virka óheft á marknaðinum, skulu takast við í metingina.

# Føroya Kærustovnur
# Avgerð um vinnumál

Sambært viðmerkingunum til § 11 í kappingarlógini, sí løgtingslóg nr. 110/2006, er marknaðarparturin eitt tað týdningarmiklasta metingarstøðið, tá støða skal takast til, um talan er um ráðandi støðu. Er marknaðarparturin hægri enn 40% er hugsandi, at fyritøkan hevur eina ráðandi støðu. Hetta er í øllum førum galdandi, um marknaðarparturin hevur verið hin sami í longri tíð. Ein marknaðarpartur, ið er meira enn 50%, kann í sær sjálvum prógva, at talan er um ráðandi støðu.

Hóast marknaðarpartur er eitt tað týdningarmiklasta metingarstøðið, so eru eisini onnur viðurskifti, so sum kappingarligt trýst, møguleiki fyri øktari kapping og bygnaðarlig og atburðarlig viðurskifti á viðkomandi marknaðinum, eitt viðkomandi metingarstøði.

ES-Dómstólurin hevur í *Hoffmann-La Roche*, mál 85/76, reglubrot 38 og 39, víst á, at:
"*begrebet dominerende stilling skal forstås som en virksomheds økonomiske magtposition, som sætter denne i stand til at hindre, at der opretholdes en effektiv konkurrence på det relevante marked, idet den kan udvise en i betydeligt omfang uafhængig adfærd over for sine konkurrenter og kunder og i sidste instans over for forbrugerne;*

*en sådan stilling udelukker, til forskel fra en monopolstilling eller et kvasimonopol, ikke, at der består en vis konkurrence, men den sætter det dominerende firma i stand til, om end ikke bestemme, så dog i det mindste mærkbart at øve indflydelse på de vilkår, hvorunder konkurrencen udvikler sig, og under alle omstændigheder i vidt omfang i stand til at handle uden at skulle tage hensyn hertil og uden at denne adfærd er til skade for virksomheden.*".

ES-Kommissiónin hevur latið gjørt eina vegleiðing um útihýsandi framferð hjá ráðandi fyritøkum, sí *Meddelelse fra Kommissionen – Vejledning om Kommissionens prioritering af håndhævelse i forbindelse med anvendelsen af EF-trakfatens artikel 82 på virksomheders misbrug af dominerende stilling gennem ekskluderende adfærd*. Í vegleiðingini verður m.a. greitt frá, hvat metingarstøði ES-Kommissiónin brúkar í sambandi við ræðið.

Sambært punkt 12 í vegleiðingini leggur ES-Kommissiónin serliga dent á trý viðurskifti, tá metast skal um ávís fyritøka hevur eina ráðandi marknaðarstøðu. Í fyrsta lagi í hvønn mun verandi útboð frá kappingarneytum og teirra støða á marknaðinum avmarkar ávísu fyritøkuna. Í øðrum lagi í hvønn mun hóttan um økt útboð frá verandi kappingarneytum og hóttan um innrás av nýggjum kappingarneytum avmarkar ávísu fyritøkuna. Í triðja lagi í hvønn mun ávísa fyritøkan verður avmarkað av tingingarmegi hjá keyparum.

Føroya Kærustovnur metir, at ymiskt er, ið talar fyri, at Føroya Tele hevði eina ráðandi støðu á heilsølumarknaðinum, og ymiskt er, ið talar ímóti, at Føroya Tele hevði eina ráðandi støðu.

Tað talar fyri, at Føroya Tele hevði eina ráðandi støðu á heilsølumarknaðinum, at farnetið hjá Føroya Tele hevði betri dekning og betri góðsku enn netið hjá Nema. Føroya Tele og Nema eru somuleiðis samd um, at netið hjá Føroya Tele var betri.

# Føroya Kærustovnur
# Avgerð um vinnumál

Tað talar eisini fyri, at Føroya Tele hevði eina ráðandi støðu, at Føroya Tele samtakið er sterkt og hevur nógvar kundar, og at hetta hevur verið støðan, síðani felagið kom á marknaðin.

Somuleiðis talar tað fyri ráðandi støðu, at eingin broyting ella nýggj kapping hevur verið á marknaðinum fyri heilsølu av FullMVNO tænastum innan fartelefoni í Føroyum í mong ár, og at hetta er ein marknaður, ið tykist at vera torførur at trína inná. Lýsingin av gongdini á marknaðinum bendir á, at nýggir kappingarneytar ikki uppá stutt skotbrá og uttan stórvegis váða kunnu trína inn á marknaðin.

Tað talar somuleiðis fyri ráðandi støðu, at ein national roaming avtala var millum Nema og Føroya Tele, ið hevði við sær, at har Nema ikki hevði dekning, kundi kundar hjá Nema reika inni á netinum hjá Føroya Tele. Kundar hjá Nema høvdu sostatt verið verri stillaðir, um eingin national roaming avtala var millum feløgini.

Kappingareftirlitið hevur sum grundgeving fyri, at Føroya Tele hevði eina ráðandi støðu, harumframt víst á, at um einki krav um sambinding var í fjarskiftislógini, so vildi netið hjá Nema verið virðisleyst, at radio access netið hjá Nema í løtuni verður niðurtikið, og at Nema tí væntandi verður kundi hjá Føroya Tele, og at FT Net hevur eina ráðandi støðu á marknaðinum fyri heilsøluavtalur um atgongd til fastnetið. Føroya Kærustovnur metir tó ikki, at hetta er viðkomandi fyri metingina av, um Føroya Tele hevði eina ráðandi støðu á heilsølumarknaðinum. Mett verður ikki, at tað er viðkomandi, hvør støðan vildi verið, um tað ikki varð ásett eitt krav um sambinding í fjarskiftislógini, at FT Net hevur eina ráðandi støðu á einum øðrum marknaði ella at Nema í 2023 tekur niður sítt radio access net.

Føroya Kærustovnur metir hinvegin, at tað talar ímóti, at Føroya Tele hevði eina ráðandi støðu á heilsølumarknaðinum, at marknaðarpartarnir eru ókendir, og at útgangsstøði í hesum málinum tí má vera, marknaðurin er opin fyri allar partar, og at Nema og Føroya Tele tí kunnu bjóða út vørur og tænastur eftir somu treytum.

Tað talar somuleiðis ímóti eini ráðandi støðu, at tað einans var í ávísum óbygdum økjum, at Nema ikki hevði dekning, og at tað ikki var lutfalsliga stórur munur á góðskuni á netunum hjá Føroya Tele og Nema. Sambært Nema høvdu 100% av fólkunum atgongd til 3G ella betri í 2017, meðan 90% av fólkunum høvdu atgongd til 4G í 2017, og Nema hevði sostatt ein dekning á umleið 95% + national roaming, ið gjørdi felagið demografiskt landsdekkandi.

Viðmerkt verður í hesum sambandi, at bæði netið hjá Føroya Tele og netið hjá Nema eru øgiliga góð, og at Føroya Tele og Nema uppá skift hava havt tað betra netið. Sambært pørtunum í málinum hevði Nema, táverandi Vodafone, tað betra netið í 2015, meðan Føroya Tele hevði tað betra netið í 2017.

# Føroya Kærustovnur
# Avgerð um vinnumál

Viðmerkt verður somuleiðis, at Kappingarráðið ikki sæst at hava gjørt nøktandi kanningar av góðskuni á netunum hjá Føroya Tele og Nema, áðrenn Kappingarráðið tók avgerð í málinum. Føroya Kærustovnur metir, at hetta, samanhildið við upplýsingunum frá Nema um dekningin av netinum hjá felagnum, hevur við sær, at tað ikki er grundarlag fyri at staðfesta, at góðskumunurin á netinunum hjá feløgunum hevur verið so mikið stórur, at hetta kann sigast at vera eitt avgerandi argument fyri ráðandi støðu. Mett verður, at tann góðskumunurin, ið var millum netini, ikki hevur avgerandi týdning fyri brúkaran, serliga tá bæði netini eru so mikið góð. Hetta talar somuleiðis ímóti, at Føroya Tele hevði eina ráðandi støðu, og Føroya Kærustovnur metir samanumtikið, at netini hjá Føroya Tele og Nema vóru kappingarfør, hvat viðvíkur góðsku.

Harumframt verður mett, at tað talar ímóti, at Føroya Tele hevði eina ráðandi støðu á heilsølumarknaðinum, at Tosa kundi tingast við Nema um eina MVNO avtalu, samstundis sum felagið tingaðist við Føroya Tele, og at Tosa endaði við at gera eina MVNO avtalu við Nema. Føroya Kærustovnur metir, at hetta talar ímóti, at Føroya Tele kundi virka óheft mótvegis sínum kappingarneytum og forða fyri, at ein munagóð kapping á viðkomandi marknaðinum varð varðveitt.

Vísandi til at marknaðarparturin ikki kann gerast upp og til avmarkaða góðskumunin á netunum hjá Føroya Tele og Nema, metir Føroya Kærustovnur samanumtikið, at tað ikki er nøktandi grundarlag fyri at staðfesta, at Føroya Tele í 2017 hevði eina ráðandi støðu á marknaðinum fyri heilsølu av FullMVNO tænastum innan fartelefoni í Føroyum.

Av tí at Føroya Kærustovnur metir, at Føroya Tele ikki hevði eina ráðandi marknaðarstøðu á heilsølumarknaðinum, er treytin um ráðandi støðu í § 11, stk. 1 í kappingarlógini sostatt ikki lokin, og Føroya Tele hevur tískil ikki við síni framferð í sambandi við tingingarnar við Tosa um eina FullMVNO avtalu framt brot á § 11, stk. 1 í kappingarlógini.

**Vísandi til omanfyri standandi hevur Føroya Kærustovnur avgjørt at broyta avgerðina hjá Kappingarráðnum.**

**Avgerðin er grundað á, at tað við støði í upplýsingunum í málinum ikki er grundarlag fyri at staðfesta, at Føroya Tele hevði eina ráðandi støðu á marknaðinum fyri heilsølu av FullMVNO tænastum innan fartelefoni í Føroyum, og treytin um ráðandi støðu í § 11, stk. 1 í kappingarlógini er sostatt ikki lokin.**